

*fyrsta oddadystin á árinum*
*Mynd: Sofus D. Johannesen*

dystur, har tað er trupult at fáa eyga á nakað flótandi spæl. Kanska vóru skálamenn við yvirlutan ein part av dystinum, men alt í alt mundi ein málleysur javnleikur verða eitt ógvuliga rættvíst úrslit av einum ógvuliga tamum dysti.

i

men á heimavølli skulu vit helst hava trý stig. Eg haldi annars ikki, at dysturin í dag var serliga væl leiktur. Vit høvdu tó møguleikarnar til at fáa eitt avgerandi mál, men tað var ikki nóg mikið, segði Egil á Bø.

## FAKTA UM DYSTIN

**HB-NSÍ 2-1 (1-1)**
1-0: John Heri Dam, 21.
1-1: Andy Olsen, 45.
2-1: Rúni Nolsøe, 90.
**HB:** Bárður Johannesen - Hans á Lag, Jóhannus Joensen, Rasmus Nolsøe, Janus M. Joensen – Rókur Jespersen (Páll M. Joensen, 82.), Rúni Nolsøe, Kári Nielsen, John Heri Dam – Jákup á Borg, Tór-Ingar Akselsen
**GK:** Janus M. Joensen, 41., Jákup á Borg, 85.
**NSÍ:** Jens Martin Knudsen – Brynjálvur Nielsen, Óli Hansen, Viggo Johannesen, Sjúrður Jacobsen – Andy Olsen, Kári Hansen (Áki L. Hansen, 82.), Dánjal Hansen, Jónstein Petersen (Jan Nónklett, 64.) – Ikechukwu Onyema (Jústinus R. Hansen, 71.), Christian Høgni Jacobsen
**Dómari:** Páll Augustinussen: Hevði ikki alla tíðina nóg gott tamarhald á, og tað dróg niður, at samskiftið við hjálpardómararnar ikki alla tíðina var nóg gott.

## MÁLINI

**1-0: John Heri Dam, 21.**
John Heri, sum nú aftur er í HB, fær bóltin í brotsteigarhorninum. NSI-verjan bíðar, og so fær nýggi maðurin stundir at smekka til flatt í handara horn, har Jens Martin einans fær hondina á.

**1-1: Andy Olsen, 45**
Tey flestu – og eisini Bárður Johannesen – bíða helst eftir, at Sjúrður Jacobsen skal royna seg við frísparki. Ístaðin smekkar Andy Olsen, sum ikki tykist ætla sær nakað, til. Bólturin strýkur upp í málhorni, og so er 1-1.

**2-1: Rúni Nolsøe, 90.**
Rúni samlar upp, tá Brynjálvur ikki fær stútað nóg væl burtur. Hann sker diagonalt inn í vøllin, og tá NSÍ-verjan áhaldandi bakkar, fær liðskiparin stundur at smekka til, og so eru stigini vís hjá HB.

HB-NSÍ 2-1 (1-1):

# Ein perla bjargaði HB

**Jens Martin Knudsen stóð í heilan hálvleik sum einsamallur skansi hjá runavíkingum, men eftir 93 minuttir mátti eisini hann geva seg, tá Rúni Nolsøe høgdi avgerandi bóltin í tríkantin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Talvan við tennisvøllin víst 92.20, tá Rúni Nolsøe fekk bóltin miðskeiðis á NSÍ-hálvuni. Staddur nakað til vinstru dróg hann inn í vøllin, og mitt fyri brotsteigin hjá NSÍ langaði hann til. Bólturin ferðaðist beina leið í hornið, og so var dysturin avgjørdur. Trý stig til meistararnar, sum soleiðis fingu vaskað tapið í premierudystinum av sær.

Kanska er tað upp á sítt pláss at tosa í ævintýrakendum formi í hesum døgum, og tað er púrasta rætt. At HB-áskoðararnir máttu ígjøgnum øgiliga nógv, áðrenn stigini vóru í HB-húsinum.

Og fyri tað heilt nógva av fyrra hálvleiki, so var eisini líkt til, at HB als ikki skuldi hava nakað sum helst eftir. Bara góð 20 sekund vóru farin, áðrenn Ike fyrstu ferð varð leiktur ígjøgnum HB-verjuna, men hann kipti bóltin sentimetrar framvið málinum. Tað sama var skilið, tá Dánjal Hansen løtu seinni drønstútaði frísparksinnlegg skeivu megin stólparótina, og yvirhøvur var HB um ein háls.

NSÍ var í útgangsstøðnum í eini 4-4-2 skipan, men við einum sera offensivum Jónstein Petersen á vinstra miðvølli broyttist hetta í tíð og ótíð til 4-3-3, har HB verjan ferð eftir ferð varð leikt púrasta tunn.

Og hóast HB legði seg á odda, so var NSÍ framvegis klárt betra liðið fyri steðgin. Einasta hóttanin frá HB var, tá Tór-Ingar setti ferð á, men hann var aloftast ov einsamallur.

Men eftir steðgin var alt viðvent. Frá fyrsta sekundi setti heimaliðið nú ferð á, og runavíkingar bakkaðu, bakkaðu og bakkaðu. Onkra tíð mundi vandi vera fyri, at alt liðið skuldi standa á Niðara vølli, men lukkutíð fyri teir høvdu teir Jens Martin í málinum.

Landsliðsmálverjin sýndi stóran klassa, tá hann ferð eftir ferð vardi fyri nærgangandi HB-atsóknum. Rókur og Tór-Ingar høvdu gyltar møguleikar, men líka mikið, hvussu stórir kjansirnir vóru, so vildi bólturin altso ikki inn.

Soleiðis vóru HB-áskoðararnir hildnir á pínubeinkinum heilt fram til evstu løtuna. Tá var tað, at Rúni Nolsøe traðkaði fram. Átøk sær leiklutin sum match-vinnari, og uttan iva eisini sum dagsins HB'ari.

# Fantasiskt

Einki er at taka seg aftur í, at Rúni Nolsøe var í sjeynda himli, tá vit eftir dystin fingu orðið á hann. Við einum dreymamáli í seinastu sekundunum var hann maðurin, sum vissaði HB sigurin, og sjálvur tóktist hann eisini hava ilt við at seta orð á kenslurnar, tá bólturin streyk inn.

- Halt kjaft hatta var deiligt. Tú hevur líka sum vant teg við tankan um, at vit bara skuldu hava eitt stig, so at fáa eitt mál somikið seint, er bara heilt fantastiskt, segði fegni liðskiparin. men hóast tað soleiðis var hann, sum gjørdist match-vinnari, so tóktist hann ikki leggja so øgiliga stórt í sín egna leiklut.

- Tað er líkamikið við málskjúttunum. Men hasi trý stigini vóru sera týdningarmikil hjá okkum. Ikki minst eftir at vit bara fingu eitt stig í Klaksvík.

Um sjálvt málið sigur Rúni, at hann rakti bóltin klokkureint, men at hann tó als ikki var vísur í, at hann streyk í meskarnar.

- Jens Martin var heilt nær við at fáa hann, men skotið líkasum skrúvaði úteftir, og tí gjørdist hann akkurát ov stuttur. Hann hevði jú eisini tikið eina rúgvu av royndum undan hesum, so tað kundi væl verið, at hann eisini skuldi taka hatta skotið.

### Komu ikki ígongd

Um sjálvan dystin helt Rúni annars, at tað tók sína tíð, áðrenn hann og liðfelagarnir komu ígongd.

- Fyrstu løtuna er heilt galið, og vit gera eina rúgvu av persónligum mistøkum. Tað var kanska heppið, at teir ikki skora tá, men spakuliga koma vit so inn í dystin. Og sjálvt um tað var sera tungt at fáa eitt mál ímóti beint fyri steðgin, so haldi eg, at vit sita á øllum øðrum hálvleiki.

*Var nakað serligt, sum tit broyttu í steðginum?*

- Nei, slettis ikki. Vit tosaðu um tingini, og tað vísti seg bara, at menn nú vóru klárir. Vit koma eisini fram til nakrar fúlar kjansir, men Jens Martin sá bara út til at taka alt, sum vit skutu eftir honum, staðfesti Rúni Nolsøe at enda – Uttan at nevna, at tað seinasta skotið fekk landsliðsmálverjin altso ikki fatur á.

**-jm**

# Nøgdur hóast alt

Trygvi Mortensen er aftur í ár venjari hjá NSÍ, og tó at hann sjálvandi harmaðist seina HB-málið sunnudagin, so var hann nóg veruleikanærur til at staðfesta, at sigurin var uppiborin.

- Tað er sjávlandi eitt vónbrot at tapa upp á hatta tíðspunktið. Men hyggur tú at dystinum, so var tað nokk í lagi. Vit høvdu so í øllum førum ikki uppiborið at vinna!

Fyrstu løtuna var tað annars NSÍ, sum setti dagsskránna, og venjarin sigur eisini, at hann var sera væl nøgdur um avrikið fyri steðgin.

- Eg haldi, at vit hava gott tamarhald á dystinum ta løtuna. Og vit kunnu eisini væl skora bæði eitt og tvey mál ta løtuna. Og eisini eftir at teir skora, megna vit at reisa okkum. Og tá vit so fáa eitt mál beint fyri hálvleik, skuldu vit av álvara verið við.

Men tað var júst tað, sum ikki hendi. Frá fyrsta bríksli av seinna hálvleiki vórðu runavíkingarnir trýstir í botn, og venjarin helt eisini, at teir ikki stóðu nóg væl eftir steðgin.

- Vit tosa annars um, hvat vit skulu halda fast um í seinna hálvleiki, men vit detta bara alt ov langt aftur á vøllin. Teir eru tá væl betri enn vit, og teir høvdu so sanniliga eisini møguleika at avgera dystin. Jens Martin heldur okkum tó inni, men tað er keðiligt, at vit soleiðis bakka undan Rúna hatta seinasta álopið. Vit vit, at hann hevur eitt gott skot, og tað fingu vit so eisini at síggja.

### Nøgdur um trý stig

Men hóast tapið sunnudagin, so staðfestir Trygvi Mortensen, at hann er væl nøgdur um byrjanina, sum runavíkingarnir hava havt í landskappingini.

- Vit fingu tveir sera truplar dystir at byrja við, og trý stig móti nummar eitt og tvey frá í fjør er ikki heilt burturvið. Var talan um fýra seg, so var eg sera fegin, men trý stig er so sanniliga eisini í lagi, staðfestir hann, áðrenn hann at enda kemur við eini lítlari ávaring.

- Men vit skulu so sanniliga ansa eftir, at vit ikki detta í nakra grøv nú. TB kemur á vitjan, og tað er als ikki víst, at tann dysturin verður so lættur, sum fleiri vilja gera hann til. Tað ræður um at taka hvørja uppgávu í álvara, staðfestir NSÍ-venjarin.

**-jm**